## Stórir trupulleikar í Holbæk

Toppliðið í 2. deild eystur í Danmark, Holbæk, hevur fingið trupuleikar. Felagið hevur ligið klárt á odda í deildini og hevur stevnt beint ímóti uppflyting til donsku 1. deild, men seinastu fýra dystirnar hevur tað gingið illa, tí liðið hevur tapt tríggjar av hesum dystum. Tað eru júst fýra dystir síðani, at fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin Henrik Larsen tók við sum venjari í Holbæk, og hann hevur tí fingið eina keðiliga byrjan í felagnum. Um vikuskiftið tapti Holbæk 2-1 ímóti Søllerød-Vedbæk. Holbæk er framvegis á odda, men nú er lítil munur millum felagið og nærmastu kappingarneytarnar.



## Horsens má styrkja seg

Liðformaðurin hjá AC Horsens, Mads Rieper, heldur, at felagið má styrkja seg til næsta kappingarár í superliguni. Í ár hevur AC Horsens, har Johan Byrial Hansen hevur verið ein av spælarunum, klára at hildið sær í deildini, men tað verður truplari næsta ár, heldur Mads Rieper.

– Vit hava havt tað sera trupult í ár, og vit skulu verða púra greiðir yvir, at tað verður enn verri næsta ár. Nú vita øll hini liðini, hvussu vit spæla, og eingin fer at undirmeta okkum næsta ár. Tí mugu vit styrkja liðið við nýggjum spælarum, sigur Mads Rieper við bold.dk

# Heimaskansin helt bara á Argjum

**LÍF tykist vera nóg sannførandi at halda tørn um oddasessin, og hóast tað bilaði eitt sindur, so fingu bæði AB og B71 fulla úrtøku, meðan FSV04 meiri enn hálvsnávaði á heimavølli**

1.DEILD 7. UMFAR

*Jóannes Hansen*

LÍF hevur verið oddalið higartil, og tað er LÍF eisini eftir sjeynda umfarið. Um gongdin framvegis verður tann, sum hon higartil hevur verið, so eru sannlíkindi fyri, at LÍF í 2007 verður partur av bestu deildini. Har hava leirvíkingar ikki verið síðani 1993. Eingin veit tó betri enn leirvíkingar, at tað er langt inntil hálvan oktober. At tað er hugaligari at kappast í tí endanum, sum LÍF nú stríðist, enn tað hevur verið at boksast í hinum endanum, vita leirvíkingar alt um.

7. umfar var merkisvert á tann hátt, at tað var bara í tí eina førinum, at tað eydnaðist heimaliðnum at fáa fulla úrtøku. 8. umfar eigur sambært skipanini at vera á skránni næsta leygardag. Soleiðis verður tað tó ikki. Orsaka av landsliðsferðini til Póllands í vikuskiftinum:

### AB-KÍ 3-2

Heimaliðið var favorittur, og inntil tíggju minuttir undan leikloki bendi einki á, at talan ikki fór at verða um trivaligan heimasigur. AB legði seg framum 3-0, tá ið tað restaði eitt korter, og argjamenn høvdu tá havt møguleikar at fáa uppaftur fleiri mál. KÍ svaraði tvær ferðir aftur síðstu 10 minuttirnar, og í síðsta trýstinum høvdu klaksvíkingar onkran hálvan møguleika afturat.

Tummas Hans Rubeksen skoraði einasta málið í 1. hálvleiki, og eftir steðgin økti AB liðformaðurin og toppskjúttin Allan Mørkøre tvær ferðir. Í seinna førinum var talan um brotsspark, sum varð dømt, tá ið Allan Mørkøre var togaður niður í brotsteiginum.

Erling Fles minkaði um munin, tá ið tað restaðu tíggju minuttir, og í síðsta minuttinum av vanligu leiktíðini var Rani Dal-Christiansen so óheppin, at hann stýrdi bóltinum í sítt egna mál, eftir at KÍ hevði sent fríspark innfyri málið. Ovi Nysted, sum hevði verið í KÍ verjuni, fór síðstu løtuna fram í álopið, men tað spurdist ikki meiri burturúr.

### FSV04-HB 1-1

Í Sandavági vilja teir fegnir vera við frammi í spíssinum. Um tað skal eydnast, so er tað neyðugt at vinna á heimavølli. Tað gongur stríggið við tí. Í fimta umfari vann B71 1-0 í Sandavági, og nú misti FSV04 aftur tvey stig á heimavølli.

Ferðin var einki at reypa av í góðveðrinum á Vall-oyrini. FSV04 hevði bóltin mesta partin av tíðini, og HB hevði kanska bestu málmøguleikarnar. Størsta møguleikan í 1. hálvleiki hevði HB, tá ið teir stútaðu í tvørtræið.

Tað tóktist leingi at skula enda málleyst. Átjan minuttir undan leikloki legði heimaliðið seg framum. Veteranurin Hannus Olsen var málskjútti. Hann lyfti úr høgru og inn fyri málið, og bólturin dalaði niður í handara síðunetið.

Hendrik Rubeksen javnaði til 1-1 fimm minuttir eftir, at FSV04 hevði lagt seg framum. Eftir innlegg úr høgru stýrdi hann bóltin í málið við høvdinum.

### SÍ-TB 2-2

Eisini í Sørvági býttu teir stigini ímillum sín, og eisini í Sørvági vóru líkindini so mikið góð, at tað tóktist ávirka ferðina. Úrslitið var 2-2, og øll málini vórðu skorað í 1. hálvleiki. Serliga síðsta løtan undan steðginum var hendingarrík.

Petur Niclasen legði SÍ framum, tá ið lítið korter var farið. Málið skoraði hann úr spískum í vinstru og í handara síðunetið.

Tíggju minuttir undan steðginum javnaði Kaj Roest, eftir at fríspark varð lagt innfyri, sum Óli Johannesen við høvdinum hevði stýrt upp á tvørs. Tveir minuttir seinni legði Búi Mortensen eftir trunkaspæl TB framum 2-1, og aftur tveir minuttir seinni javnaði Jens Erik Rasmussen til 2-2. SÍ fór í skjótt mótálop í høgru, og Jens Erik var leysur, tá ið bólturin varð lagdur innfyri.

### Royn-B71 1-2

Hvalbingar eru framvegis stigaleysir. Hesa ferð var um reppið, at teir megnaðu javnleik móti einum av oddaliðunum. Royn stríddist so at siga fyri lívinum. Um hugburðurin verður tann sami næstu ferðirnar, so kann tað so væl fara at vera, at teir fara at vinna stig og sigrar.

Einki mál kom í 1. hálvleiki. Fýra minuttir eftir hvíldina legði Rasmus Nielsen B71 framum eftir skjótt álop í vinstru og innlegg frá Magnusi Olsen. Miðskeiðis í 2. hálvleiki javnaði liðformaðurin hjá Royn, Frits Eið. Hann umsetti úr ellivu metrum, eftir at brotsspark var dømt fyri at halda.

Sigursmálið skoraði topp-skjúttin Clayton Soares. Eisini í hesum førinum átti Rasmus Nielsen sín lut, tí tað var hann, sum legði bóltin fram ímillum til Soares, sum rann verjuna av.

### VB/Sumba-LÍF 2-4

Heimaliðið var tvær ferðir á odda. Báðu ferðirnar fekk oddaliðið teir aftur, og at enda var tað LÍF sum vann.

Páll Brattalíð átti fyrra VB/Sumba málið. Tá var eitt korter farið, og tíggju minuttir seinni javnaði Magnus Skoralíð til 1-1. Dómarin dømdi brotsspark fyri hands. Heini Jacobsen hálvbjargaði royndini úr ellivu metrum, men Magnus Skoralíð var sjálvur fyrstur á returbóltinum.

LÍF fekk eitt brotsspark afturat í 1. hálvleiki, sum eisini varð dømt fyri hands. Magnus Skoralíð hevði eisini ábyrgdina av tí royndini, men ta ferðina bjargaði Heini Jacobsen.

Tveir minuttir eftir steðgin fekk VB/Sumba brotsspark fyri hands. Kári í Lágabø var tryggur av brotssparksblettinum.

Heimaliðið var framman-fyri bara í fýra minuttir. So svaraði miðvallarin Allan Joensen aftur, og so var LÍF betri. Bárður á Lakjuni legði teir fyri fyrstu ferð framum, og Magnus Skoralíð bøtti um brotssparksmissin, tá ið hann stutt undan leikloki staðfesti 4-2 LÍF sigurin.

## FAKTA

**FAKTA UM 1. DEILD**

**AB-KÍ 3-2 (1-0)**
1-0: Tummas Hans Rubeksen 34.
2-0: Allan Mørkøre 60
3-0: Allan Mørkøre br 75
3-1: Erling Fles 80.
3-2: sjálvmál 90.

**FSV04-HB 1-1 (0-0)**
1-0: Hannus Olsen 72.
1-1: Hendrik Rubeksen 77.

**SÍ-TB 2-2 (2-2)**
1-0: Petur Niclasen 12.
1-1: Kaj Roest 35.
1-2: Búi Mortensen 37.
2-2: Jens Erik Rasmussen 39.

**Royn-B71 1-2 (0-0)**
0-1: Rasmus Nielsen 49.
1-1: Frits Eið br 65.
1-2: Clayton Soares 80.

**VB/Sumba-LÍF 2-4 (1-1)**
1-0: Páll Brattalíð 15.
1-1: Magnus Skoralíð 24.
2-1: Kári í Lágabø br 47.
2-2: Allan Joensen 51.
2-3: Bárður á Lakjuni 55.
2-4: Magnus Skoralíð 89.

# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.